

# um á ársins VEITSLU

*Hvat á jørð kann meira herligt vera enn ein føroysk miðjansummarnátt?*

Rasmus Effersøe

enn í einum heimi. Til ber at víðka um rúmið við at læna nøkur grannahús ella við einum uttandura tjaldi. Tað er eisini vorðið alt vanligari at leiga seg inn í á eina matstovu ella á café.

**Færri, men góðar gestir**

Her koma vit automatiskt inn á hetta við at bjóða so nógvum gestum, ja ofta fleiri hundrað fólkum. Kanska tí vit í Føroyum eru bebberødd fyri, at onnur skulu føla seg forfjónað og skulu tosa ljótt um okkum. Fólk, sum vit hvørki kenna serliga væl ella hava nakað í felag við. Hví so bjóða teimum? Tað krevur sjálvandi dirvi at bjóða færri og útvaldum gestum, tí nógvastaðni »plagar« man altíð at bjóða í hundraðtali. Men í hesi grein er »plagar« deyður! Skal veitslan gerast væleydnað, má tað vera verturin ella vertsparið, og ongin annar, sum ger av, hvør skal við, og hvussu veitslan skal vera.

**Krás fyri góman**

Eitt annað, sum kundi gjørt veitsluna til eina dygdargóða heildaruppliving er maturin. Fyrr í tíðini, tá ráðini vóru ikki so góð, var matur, og serliga kjøt og sós tað reina luksus. Í dag er hetta gerandis, meðan tað kreativa og forkunnuga er veistla. Eisini í hesum føri hevði tað loyst seg at bjóðað eitt sindur færri fólkum, sum so kundu fingð ein serliga góðan veitslubita. Til dømis vilt, útlenskt, sushi, grill, tapas, fugl ella okkurt heilt annað. Ongin sigur, at verturin sjálvur skal kokkast. Tað eru nógvir fínir kokkar og kókikonur, sum duga framúr væl at ganda í køkinum.

**Jamma til tann ljósa morgun**

Tónleikaliga kann ein veitsla skjótt gerast ein niðurtúrur hjá musikalskum fólki. Eisini á hesum økinum ber til at finna upp á okkurt skeg, sum ikki nýtist at kosta meira enn eitt hálvvánaligt hoppsassa amatørorkestur. Til dømis ber til at biðja ein ella tvær yrkistónleikarar framføra afturvið vælkomudrykkinum ella undir borðhaldinum. Og um tú ikki fært eitt supersvingandi dansiorkestur ella ordans harmonikuramasjang, so ber saktans til at spæla góðan dansitónleik úr anlegginum. Uppaftur betri: Er hópin av tónleikarum millum gestirnar, kanst tú biðja teir taka ljóðføri við – ein nátt við spontanum, heimagjørdum jammi og dansi, har øll kunnu vera við, er ball, tá tað er best.